

Gassframleiðsla á Orminum Langa í norskum sjógvi. Mynd: Shell

# Mærsk er helst einasti møguligi keypari av DONG

**Jógvan Hugo Gardar**

23.09.2015 - 08:25

Oljan.fo

Gjøgnumgongdin av virkseminum hjá DONG kann enda við at olju- og gassdeildin hjá fyritøkuni verður seld. Norski greinarar eru á einum málið um at tað eftir øllum at døma bara er ein møguligur keypari av fyritøkuni í Norðanlondum, og tað er Mærsk. Hetta skrivar Berlingske Business.

Hóast Dansk Olie og Naturgas, stytt DONG, hevur danskt í sínum navni, so er meir enn 90 prosent av teimum umleið 100.000 oljulíkunum sum fyritøkan framleiðir, framleidd í norskum sjógvi.

Forstjórin í DONG, Henrik Poulsen, segði við Berlingske Business, aftaná at hann hevði almannakunngjørt at tey eru farin undir at venda hvørjum steini í fyritøkuni, at úrslitið kann gerast at olju- og gassdeildin verður seld.

Norskir greinarar sum Berlingske Business hevur tosað við vísa allir á at tað í løtuni neyvan er nakað norskt oljufelag sum hevur áhuga í DONG.

Orsøkin til at greinararnir , at kalla allir, peika á Mærsk sum einasti møguligi keyparin, er at flestu furitøkurnar, harímillum Statoil, í løtuni arbeiða við at selja burturav virkseminum, fyri at fyrireika seg til framtíðina. Tí fara tey ikki at gera nýggjar íløgur sum støðan er.

Spurningurin er so um Mærsk heldur at prísurin fyri DONG er tann rætti, og tað kann hugsast at metingin hjá teimum í løtuni er at prísurin er í hægra lagi. DONG hevur framleiðslur á fleiri økjum, og keyparar leita í løtuni eftir teimum sum hava bestu góðskuna, og har eru ikki øll loyvini hjá DONG heilt við í kappingini.

Í Norðurlendskum høpi er DONG eitt stórt felag, og liggur á triðja plássi, mett eftir umsetningi, eftir Statoil og Maersk Oil.